# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðdis Hartmann Niclasen, løgtingskvinna

**Svarari:** Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

**Evni:** Laksaroyndir í føroyskum sjóøki

**Spurningar:**

1. Hevur landsstýrismaðurin sett í verk royndir, saman við Havstovuni, at fáa til vega upplýsingar og vitan um laksin í føroyskum sjóøki?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin at kanningar fara í gongd?
3. Kann landsstýrismaðurin meta um, nær eitt úrslit verður tøkt?

**Viðmerkingar:**
Herfyri var júst evnið um at gera laksaroyndir í føroyskum sjóøki til umrøðu í Løgtinginum, og man var samdur um at slík vitan um laksin er bæði neyðug og áhugaverd og hevði gjørt okkum betri før fyri at lagt til rættis fiskarí og atknýtt vinnuligt virksemi.

Tí er endamálið við hesum fyrispurninginum at útvega meira vitan um, í hvønn mun laksur er á landgrunninum, hvussu stórar nøgdirnar eru, og hvar hann møguliga heldur mest til o.a.

At dyrgja eftir laksi við bátum er ein væl umtókt upplivingarvinna, sum er sera inntøkugevandi í øðrum londum, sum fáast við hesa vinnu. Tí verður mett, at henda vinnan kann gerast ein spennandi vinna fyri okkum sjálvi og somuleiðis gerast eitt eyka bein hjá føroysku ferðavinnuni.

Málbólkurin av ferðafólkum, sum ferðast runt eftir laksafiskiskapi, rindar fegin fyri slíka uppliving, og vit í Føroyum fáa ein serligan málbólk afturat, sum vil leiga bátar, umframt hevur brúk fyri vanligum uppihaldi og nýtir okkara matstovuvirksemi, ferðaseðlar og mangt annað.

Tað er nógv, sum bendir á, at stórir vinnumøguleikar eru innan laksafiskarí í føroyskum sjóøki, og í hesum sambandi eiga nakrir kappingarførir vinnukarmar at verða skaptir av politisku skipanini, grundaðir á holla vitan um laksin.
Tí verður hesin fyrispurningur settur.

**Á Løgtingi, 21. juni 2024**

Eyðdis Hartmann Niclasen